gult cyan magenta svart

Fyrstu útlendsku oljuhjúnini seta búgv í Leynum

-Okkum n‡tist ikki at búgva í Havnini fyri at skula arbei›a í oljuvinnuni her. Vit taka ta› sum eina spennandi avbjó›ing at kunna búgva í Leynum. Ta› vil vera stytri lei› til arbei›is enn um tú var í London sigur Chris Kernick, sum man vera ein tann fyrsti útlendski oljuarbei›arin, sum saman vi› konuni setir búgv í Føroyum í sambandi vi› komandi leiting

Chris og Kate halda seg vera ómetaliga heppin at kunna koma til Føroya. Chris heldur fyri, at mangur man øvunda honum vakra úts‡ni› yvir Vágsbotn.

Jan Müller

Hóast ta› er ein gó›ur mána›i, á›renn føroyskir myndugleikar fara at b‡ta út tey fyrstu loyvini til oljuleiting, so eru fyrstu útlendsku "oljuhjúnini" longu longu vi› at festa búgv her á landi. Australsku hjúnini Chris og Kate Kernick hava leiga› sær eini hús í Leynum vi› tí fyri eyga›, at tey skulu vera her í nøkur ár - tó vi› teirri fyritreyt, at oljufelagi› Chris arbei›ir hjá, Texaco, fær lovyi at bora eftir olju og gassi.

-Ta› kann tykjast í so næsadjarvt av okkum at flyta til Føroya og at seta búgv her, á›renn vit vita, um felagi› fer at fáa lisens sigur Chris Kernick, sum er útbúgvin geofysikari og sum í eina tí› hevur arbeitt burturav vi› føroysku undirgrundini. Hann heldur ta› tó vera rætt at vera uppá forkant bæ›i havt vi›víkur skrivstovu og íbú›.

-Fyri eitt felag sum okkara er ta› t‡dningarmiki› at ver›a væl fyrireika›, tá og um vit fáa eina lisens í einum n‡ggjum øki sum Føroyum sigur Chris, sum fór til arbei›is á n‡ggju skrivstovuni á Bryggjubakka í farnu viku. Og hóast hann ikki hevur veri› leingi í Føroyum, so dámar honum so væl her, at hann og konan Kate fegin vilja vera her í nøkur ár. Bæ›i eru tey úr Australia, men hava búleikast í London seinastu árini. Me›an hann er í oljuvinnuni heldur hon seg til lesna›in. Hon er eisini naka› væl yngri, men hevur so kortini tiki› avger› um vera verandi í Føroyum saman vi› manninum. Hon ætlar sær at halda fram vi› hægri lesna›inum, me›an hon b‡r í Føroyum.

Um ta› er gó›a ve›ri› og tann ljósa tí›in, sum eru orsøkin, skal ver›a ósagt. -Eg haldi meg vera ómetaliga hepnan at hava fingi› henda møguleikan. Onkur vildi kanska kent seg fremmandan her, men hetta er hvørki sum at koma aftur í mi›øldina ella at meta sum heimsins endi. Her er bara frálíkt at vera heldur 46 ára gamli Chris Kernick.

Í løtuni búgva tey á Hotel Tórshavn og hava tey bara alt gott at bera teimum har. Men eitt hotel er einki verandi sta› fyri tey, og tí hava tey í eina tí› roynt at útvega sær eina íbú› ella eini sethús. Og tá so eini hús stó›u teimum í bo›i í Leynum tóku tey av.

-Eg eri vanur vi› at brúka upp til ein tíma at koma til arbei›is í London, so ta› er als einki ónáttúrligt at skula taka bussin í Leynum og koyra til Havnar uppá væl minni enn ta›.

Bæ›i eru tey eisini rættiliga ovfarin av tí stø›i, sum nærum alt er á í føroyska samfelagnum. Tey høvdu t.d. ikki droymt um, at so nógvar vørur vóru at fáa í Havnini.

Teimum dámar eisini væl at ganga úti í náttúruni og hava tey longu lagt nógvar kilometrar eftir seg. Nú um dagarnar vór›u tey í Elduvík, har tey stukku inn á gólvi› í Lonini, og har fingu tey ta best hugsandi tænastuna og gó›an mat. Nú bí›a tey so eftir at fáa fast undir fótum og kunna læra seg føroyskar si›ir og ikki minst máli›. Bæ›i eru tey ovfarin av, at flest allir føroyingar duga so væl enskt.

Chris er longu farin til arbei›is á skrivstovuni í Havn, har tvær sera kraftmiklar arbei›sstø›ir eru settar upp til at tulka seimsikk oa.

Útbúgving í Australia

Chris hevur arbeitt nógv ár sum geofysikari í oljuvinnuni, serstakliga í heimlandinum, Australia, har hann eisini fekk sína útbúgving á lærda háskúlanum í Perth. Hann var vi› til at útvikla fyrsta oljufelti› til havs vi› Australia og hevur eisini arbeitt vi› ø›rum økjum so sum Cambodia, Thailand og Kina.

Umframt Chris eru eisini nakrir a›rir útlendingar, i› longu virka í føroysku oljuvinnuni. Ta› eru tó fólk, sum standa á odda fyri skrivstovum ella arbei›a hjá føroysku myndugleikunum. Teirra millum er stjórin hjá Saga Petroleum Føroyar, Geir Atle Rishovd og Alex Buvik, sum arbei›ir hjá Oljumálast‡rinum, har hann stendur á odda fyri trygdarpartinum av komandi oljuleiting. Bá›ir eru teir nor›menn.

Men sohvørt ta› nærkast komandi loyvisgeving er greitt, at øll luttakandi oljufeløgini gera seg út til at lata upp skrivstovur og fáa nøkur av fólkum sínum henda vegin. Roknast má tó vi›, at ta› ver›ur avmarka› í fyrstu syftu, hvussu mangir útlendingar koma at arbei›a í Føroyum vi› komandi leiting. Roknast má vi›, at feløgini eisini fara at brúka føroyska arbei›smegi í tann mun hon er tøk og brúk er fyri henni.

Rætt at gera arbei›i› her

Sjálvur heldur Chris Kernick, at ta› er rætt av føroyska samfelagnum at seta ynski fram um, at so nógv av arbei›inum sum til ber ver›ur gjørt í Føroyum. Tí ta› er jú føroyska samfelagi›, sum fyrst og fremst skal hava ágó›an av at byggja upp hesi n‡ggju vinnu. Hann metir ta› tí eisini vera rætt av oljufeløgunum at byggja upp eina ekspertisu her á sta›num. -At eg so eri ein av teimum hepnu, sum sleppur av vera vi› í hesum arbei›i kann eg bert gle›ast um leggur hann aftrat.

Chris dylur heldur ikki fyri, at arbei›sumstø›ur hansara her eru munandi betri enn tær hava veri› í t.d. London. Me›an tú har hevur kanska einar 24 arbei›sstø›ir, sum bert hava atgongd til ein servara, so hevur tú hevur tvær stórar arbei›sstø›ir, sum hava atgongd til ein servara. Hetta ger, at me›an tú brúkar kanska upp til ein minut at fáa ting fram á skermin í London, so ganga bert fá eini tvey sekund her.

Kann taka tí›

Tá vit spyrja Chris, hvussu hann metir vónirnar fyri at finna olju her sigur hann, at tær eru gó›ar. Hann heldur hetta vera eitt sera spennandi øki, tó at ta› eisini eru trupulleikar her. Her sipar hann ikki minst til tjúkku basaltfláirnar. Men teir síggja sera stórar strukturar, ja í heims flokki. Teir vita tó ikki, um oljan er goymd har. Tó so, at teir meta hetta sum ein gó›an møguleika. Chris heldur føroysku myndugleikarnir hava duga› væl at lagt til rættis og hevur hann eisini varhugan av, at myndugleikarnir heldur enn at vilja hava eina skjóta leiting í gongd, vilja tryggja sær, at leitingin ver›ur so munagó› sum tilber og solei›is at sum mest av arbei›inum kann ver›a gjørt úr Føroyum.

-Eg haldi ikki man skal vera kløkkur, um olja ikki ver›ur funnin fyrr enn um eini tr‡ ár. Tit eiga at ver›a fyrireika›ir uppá, at tann fyrsta og næsta boringin ikki treffir vi› olju. Hóast vit halda okkum vita nógv um undirgrundina, og ta› eru royndir frá økinum nærhendis, so eru ta› altí› "yvirraskilsi" í hesi vinnu.

Hvørji feløg enn fáa lisensir, so heldur Chris Kernick, at hetta kann blíva ein spennandi tí› og stór avbjó›ing fyri Føroyar. Eitt eru so tey mest áhugaverdu økini vi› marki›, men ta› liggja eisini stórar avbjó›ingar fyri framman, tá talan ver›ur um at hyggja nærri at teimum strukturunum, sum liggja undir tjúkka basaltinum.

gult cyan magenta svart

Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini
Ítróttasosialin
á alnótini
www.sosilaurin.fo

Ray Clemence kemur til Føroya

Fyrrverandi Liverpool málverjin er málmansvenjari hjá eingilsku U–16 landsli›num, sum í a›ru viku skal luttaka í NM í Gundadali

Ray Clemence, sum á myndini sæst verja máli› hjá Liverpool, man helst vera navnframasti gesturin, sum kemur á føroyavitjan í.s.v. U-16 kappingina

Kanska teir yngstu lesararnir ikki beinanvegin komast vi› navni›. Men millum teirra, sum fylgdu vi› í eingilskum fótbólti í sjeyti og áttati árunum, er Ray Clemence eitt sera kent navn.

Tøkniliga menningin og harvi› krøvini til ta›, sum ta› ber til at síggja í sjónvarpinum, broytist vi› rúkandi fer›. Fyri einari fjór›ings øld sí›ani var ta› spennandi hjá teimum, sum annars høvdu fylgt vi› eingilskum fótbólti í BBC útvarpinum, at fara í HB húsi› (nú eitur ta› bridge húsi›) í Gundadali at síggja fótbólt. Hetta plagdi at vera t‡skvøld. Dystirnir, sum vóru á skránni, vóru teir, sum høvdu veri› at sæ› í donskum sjónvarpi leygardagin frammanundan. Summir (ta› vóru bara mannfólk, sum møttu upp) vildu ikki vita úrsliti› frammanundan. Hjá teimum mest áhuga›u bilti ta› einki, at teir leygardagin frammanundan høvdu so at siga siti› inni í lurtitólinum og fylgt vi›. Teir kendu dystargongdina, sum teir høvdu hoyrt greitt frá, og í HB húsinum fingu teir so at siga sjón fyri søgn.

Broyttar tí›ir

Liverpool mundi vera ta› felagi›, sum um hetta mundi› vann mest í Onglandi. Bill Shankly var legendariski venjarin inntil 12. juli í 1974. Tá leg›i hann frá sær, og eftir hann tók ein av teimum vi›, sum hev›i veri› í felagnum sí›ani undan 2. heimsbardaga. Navni› á honum var Bob Paisley, og vi› honum vi›ró›ri› vann Liverpool uppaftur meiri, enn teir høvdu gjørt frammanundan.

Sí›ani Liverpool var mest vinnandi felagi› í eingilskum fótbólti í sjeyti árunum og í áttati árunum er nógv broytt. Inntil fyri einum tveimum árum sí›ani kom ta› ikki upp á tal, at felagi› skuldi hava ein venjara, sum var a›ra sta›ni enn úr felagnum sjálvum, og ta› kom yvirhøvur ikki upp á tal, at hann skuldi vera a›ra sta›ni frá enn úr Onglandi.

Nú royna teir í Liverpool at byggja eitt n‡tt li› upp, sum skal hava møguleika at bjó›a Manchester United av í kappingini um fremsta plássi› í Onglandi og harvi› luttøku í europeisku meistarakappingini. Ta› gera teir vi› einum fransmanni vi› ró›ri›.

Legendirnar

Nú eru ta› kanska ikki upp á seg so mangir Liverpool vi›haldsmenn í Føroyum, sum ta› vóru fyri einari fjór›ings øld sí›ani. Men teir eru framvegis nógvir.

Fyri tey, sum fyri einari fjór›ings øld sí›ani tóku á vi› meiri vinnandi felagnum í kenda havnarb‡num, eru ta› nógv nøvn, sum standa púra fesk í huganum. Eitt teirra er Kevin Keegan, sum nú er eingilskur landsli›svenjari. Keegan var í álopinum saman vi› John Toshack. Hesin seinni var› seldur til Spania, og hann hevur sí›ani veri› venjari í Real Madrid, umframt at hann eisini hevur tiki› sær av walisiska landsli›num.
Sí›st í sjeyti árunum var› Kevin Keegan seldur til Hamburg, og so keyptu teir í Liverpool skotska landsli›smannin Kenneth Dalglish úr Celtic. Hann var leingi fastur fúsur í álopinum, og seinni var hann venjari í Liverpool.
Saman vi› nærlagda skotanum var walisiski málslúkurin Ian Rush í Liverpool álopinum. Tá Wales var á Svangaskar›i og spældi HM undankappingardyst 6. juni í 1993, var Ian Rush, sum framvegis umbo›a›i Liverpool, millum málskjúttarnar. Wales vann 3–0, og Liverpool ma›urin skora›i sí›sta máli›. Tá Føroyar vóru í Wales 9. september í 1992, var Ian Rush ikki blí›ur. Wales vann 6–0, og Liverpool ma›urin skora›i tríggjar fer›ir hjá Jens Martini Knudsen.

Eitt anna› kent navn í Liverpool var Ray Kennedy. Henda mi›vallaran keypti Bill Shankly úr Arsenal. Hetta var sí›sta keypi›, sum hann gjørdi, og prísurin var 200 túsund pund. Ta› var óhoyrt fyri 26 árum sí›ani. Eftir at hann var givin at spæla fótbólt, fekk Ray Kennedy parkinson sjúkuna.

Kendasta navni›

Men kanska var kendasta Liverpool navni› fyri 25 árum sí›ani Ray Clemence. Í HB húsinum sóu tey, sum vóru áhuga› í eingilskum fótbólti, henda dámliga mannin í tríggja daga gomlum dystum gera manga gó›a bjargingina, umframt at hann var skilagó›ur í útspælinum og st‡rdi kendu monnunum í verjuni væl.

Og nú ver›ur høvi aftur at síggja Ray Clemence í Gundadali. Eftir glæsiligu árini í Liverpool flutti Clemence, sum á landsli›num kappa›ist vi› Peter Shilton, til Tottenham. Eftir at hann er givin at spæla fótbólt, hevur Clemence ofta veri› at hoyrt sum vi›merkjari í BBC útvarpinum. Nú hevur hann í eina tí› veri› venjari hjá málverjunum á eingilska landsli›num. Tá EM kappingin var í Hollandi og Belgia fyrr í summar, sást Clemence á beinkinum. Hann var í starvi hjá gamla li›felagnum í Liverpool, Kevin Keegan.

Annan sunnudag kemur eingilska U–16 landsli›i› til Føroya. Teir skulu í vikuni eftir ólavsøku taka lut í NM kappingini, sum ver›ur í Gundadali. Sambært listan vi› nøvnunum, sum FSF hevur fingi›, so ver›ur Ray Clemece vi› í fer›alagnum. Hann stendur at vera venjari hjá málverjunum. Ta› er einki at ivast í, at ta› fara at vera fleiri, sum fara at n‡ta høvi› at heilsa upp á kenda málverjan. Ikki minst Liverpool vi›haldsfólkini, sum fyri einari fjór›ings øld sí›ani leygardagar lurta›u eftir BBC og tveir ella tríggjar dagar seinni sóu somu dystirnar í HB húsinum!

jh

SOLAR FØROYAR

Starvsfólk søkist at byrja skótast

Arbeiðsuppgávur:
Talan er um fjølbroytt arbeiði í umfatar sølu av alarmútgerð, edv, tele og alt tað ein elinnleggjari hevur brúk fyri.

Førleikakrøv:
Tann sum settur verður skal helst hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil hevur eisini fyrimun.

Fyrispurningar og umsókn verður at senda til:

Solar Føroyar
Postboks 105
Brekkutún 2
110 Tórshavn
Tlf. 317933

Sosialurin - 311820